VIÐMERKINGAR

Rættarskipan – Rættar sjálvtøku) skipan

Niels Olaf Eyvindsson

Sagt verður, at tíðin er broytt, men enn tykist tað mær at nøkur liva í einari aðrari tíð. Eg ivist eitt sindur, um tey ikki liva áðrenn okkara tíðarrokning. Sagt verður, at vit hava heimsins bestu rættarskipan. Ein er ósekur, líka til ein er funnin sekur og dømdur. Tað er ein av hornasteinunum í okkara rættarskipan. Ein annan hornasteinur er, at tá ein hevur sitið sín dóm kann ein ikki lastast fyri sínar gerðir, ið ein er dømdur, og hevur bøtt, fyri.

Hví ákæra fólk uttan fyri rættardyr og ikki føra tey inn um dyrnar?

Hví ikki draga tey í rættin, skjalprógvað sína ákæru móti teimum og fáa tey dømd?

Tað er jú har brotsmenn og -kvinnur hoyra heima ella rættari sagt hava hoyrt heima í gjøgnum tíðirnar!

Hví ikki lata rættarskipanina ákæra og døma brotsmenn og -kvinnur?

Hví eru enn fólk, ið ikki hava fatað, at vit hava heimsins bestu rættarskipan?

Hví eru enn fólk, ið ikki vita, at einhvør er ósekur, líka til ein er funnin sekur um, og dømdur?

Hví eru enn fólk, ið døma onnur?

Er tað ikki tað, vit hava dómsvald og dómstólar til?

Hví verða fólk tilsvínað, ákærd og dømd uttan rættarsøk, hetta ger seg serliga galdandi av ávísum miðlum í okkara lítla samfelagið?

Er tað ikki tekin um at ein ella annar vil spæla »sjálvtøku-rætt«?

Eg spyrji bara!!

Hví skal so ein, ið hevur sitið sín dóm, ikki lastast fyri sínar gerðir?

Svarið er einfalt - viðkomandi hevur sitið sín dóm og er aftur reinur og fríur. Talvan er vaskað rein, og ein kann byrja aftur - antin í sama spori ella finna eitt nýtt spor at ganga eftir.

Hvør vil dømast uttan rættarsøk og uttan møguleika at verja seg í rættinum?

So leingi vit liva í einum siviliseraðum rættarsamfelag, so mugu vit halda okkum til tær niðurstøður, sum rættur og ríkisadvokatur koma framm til, til einahvørja tíð. Er rætturin komin til eina niðurstøðu, so er tað fullkomuliga líka vítt, í hvønn mun Per ella Pól hava eina aðra meining.

Tíverri hava vit her í Føroyum, fólk, sum hava tikið sær rættin at verða rættvísins apostlar - tó higartil einans til stóran ampa fyri nógvar føroyingar. Hesir apostlar hava verðið við at døma seg sjálvan. Ikki sørt láturligt má sigast, men tó halda hesi á at chikanera fólk dag og dagliga.

Tað mátti verið ikki sørt ørkymlandi at sæð flestu fólk ganga av vegnum fyri einum, ella undan einum, fyri at umgangast ein, ístaðin fyri at siga góðan dagin, hvussu gongur, ella bert heilsa siðiliga uppá ein.

Føroyar undir kalda krígnum

Hergeir Nielsen



Á tingfundinum onsdagin varð løgmaður spurdur, um hann ætlaði at fáa kanningarnar av køldu fortíð okkara eystanfyri aftur á beint, og um so skuldi verið, varð løgmaður spurdur, hvussu hann kundi hugsað sær at gjørt hetta.

Men tíverri vísti løgmaður seg at hava lítið upp á hjarta í hesum máli.

Sum vit vita, so er granskingarúrslitið av Føroyum undir kalda krígnum lagt úr hondum.

Granskarin sigur, at hann ikki hevur fingið nóg nógv burturúr kanningum sínum í Moskva, tí russisku myndugleikarnir hava ikki vilja veitt honum neyðuga innlitið í skjalagoymslurnar hjá fyrrverandi Sovjetsamveldinum.

Kortini er granskarin komin út við rúgvismiklum tilfari, og hevur ma. endurtikið tað, sum føroyskir granskarar hava lagt úr hondum. Harafturat er hann komin við ikki nóg væl grundgivnum og ikki vísindaliga prógvaðum skuldsetingum og illgitingum mótvegis navngivnum persónum.

Í sínum uppruna er tað eitt álvarsligt mistak at biðja danir skriva søgu Føroya, og rímiligt hevði tí verið, um løgmaður sum skjótast ásannaði, at granskarin ikki maktaði uppgávu sína.

Skilligt er, at frágreiðingin verður lisin av fjøld av útlendingum, sum ikki duga at meta um virðið í hesum granskingararbeiðið.

Hinvegin eigur málið ikki at støðga her. Vísandi til galdandi avtalur millum norðurlond og Rusland um kanningar av hesum slag kundi landsstýrið vent sær til eitt norðurlendskt ríkisskjalasavn og biðið um eina tænastu frá teimum á hesum øki.

Verður hesin leistur nýttur, ber eisini til hjá føroyskari søguvísund at verða umboðað í hesi gransking.

Tíverri hefti løgmaður seg lítið við hesi hugskot.

Ílatin viljan hjá Fólkaflokkinum vísti hann seg ikki at hava størvegis hug til at gera nakað við hetta álvarsmál, sum undanmaður hansara setti í verk eftir uppskrift frá blaðstjóranum á Dagblaðnum.

Genteknologi, klovning, dýr og menniskju?

Hans Birgir Hansen
Ps. Íverksetari í føroyskum bløðum

Eg eri sannførdur um at genteknologiin er upprunin til klovning av djórum og menniskju á fosturstøði í skapar grundarlagið, fyri tveimum ella fleiri, eins djórum og menniskjum!

Eg eri sannførdur um, at genteknologiin og klovning av djórum og menniskjum, er upprunin til einstátta fyriskipa lív, djórum og menniskjum, ið stýrd eru av teim, sterku peningakreftum!

Eg havi áður fingið kunnleika, hvussu heimurin gjørdist offur fyri einari heimsumfatandi samansvørjan, tá eg havi lisið bók hjá Gary Allen: Ongin torir kalla tað samansvørjan.

Eg havi áður frætt um hvat endamálið er, við genspleisaðum matvørum, og hvørs slíkt hevur til endamáls, at ávirka genetisku arvaeginleikar, djór og menniskju, ið vil broyta áðurnevndu!

Eg síggi hvussu álvarsliga statt fer at tá størsti parturin av øllum ættarliðum, um, av føroyingum ikki hava nakra sjálvstøðuga hugsan, tá øll dagliga lýða harraboð teim valdstystandi!

Eg eri glaður fyri, at ein er setur uttanfyri, heiladálkan, vaskan, indoktrinera, av sinnalagnum umskapan til menniskjaligan robott við tómari og innihaldsleysari tilveru í dag.

Eg kenni upprunan til skaðiliga ávirkan í pedagogik, psykologi, psykiatri, hvussu skal seg fráleru og undirvísing ið eg áður havi umrøtt í lesarabrævum í bløðunum!

Eg havi sjálvur verið offur fyri eini røð av kenslurápum og samansvørjanum, ið ikki hava givið arvafíggindum tey úrslitini hesi væntaðu, ið tæna teim samansvornu kreftum við fleiri! Eg kann siga at pedagogik, psykologi, psykiatri, er høvuðsupprunin til ófriðarlig børn, ungdómar, tilkomin og til skipa harðskap, kriminalitet, slagsmál, stuldur, innbrot v.m. Eg havi áður funnist harðliga at fakligu útbúgvingum teir ið eru barnauppalarar, pedagogar, hjálparfólk, lærarar, sálarfrøðingar, læknar, sjúkrasystrar, teologar, politistar v.m.

Djóraroyndir eru fyrimyndin, børn, ungdómum og tilkomin eldri fólki, ið ikki klára stýra sínum egnu hugsanum, atburði, hugburði, málburði, hvat ið øll tey ófriðarligu avdúka í dag!

Tað er gott at kunna økja neyðuga innlit, forstáilsi, tilvitan í øllum tørva at síggja samanhangandi heildarskipan og støðuna, og hvat gongur fyri seg aftan gardinur í dag!

Skulu land og fólk pínast niður, áðrenn nakað nýtt virksemið sær dagsins ljós?

Finnleif Guttesen
Tvøroyri

Hesin tanki sýnist at vera frammarlaga hjá fleiri politikarum, búskaparfrøðingum og øðrum við.

Hví hevur so lítið nýtt virksemið, hjá vinnuni og landið, vunnið frama tey seinastu 6-8 árini, har at kalla øll viðurskifti hava verið jalig og inntøkan hevur verið góð?

Hetta er kanska ikki so ringt at skilja. Hví gera broytingar, tá ið tað gongur væl? Hví finna uppá nakað annað?

Nú eru útlitini daprari, og tá er løtan, at nakað má gerast. Við búskaparligu útlitinum, sum nú eru, vera krøv um broytingar bráðneyðug. Citat eftir grein hjá Kjartan Hoydal í Fregnum nr.7. 2004.

Stjórin á Menningarstovuni sigur í Dimmu nr. 45, at nýhugsan skal til, - at tað er luturin hjá vinnuni, og at eingin stuðul skal latast. Gud viti, hvat vit skulu hava Menningarstovuna til, við so stirvnari hugsjón.

Við hugsjónunum hjá hesum báðum og øðrum við, so skal land og fólk pínast niður, áðrenn nakað nýtt virksemi sær dagsins ljós her á landið.

Hesir hava ikki stóra tiltrúgv til tað fólkið, sum býr á hesum klettum og teir politikarar, sum hava verði og eru valdir á ting. Men, hava teir kanska rætt í sínum mistreysti um politikarar og vinnulívsfólk, tá ið vit hyggja eftir hvussu lítið nýtt er komið av skafti tey seinastu 6 árini, sum hevur verði ein gulltíð í Føroyum? Eg vóni tað ikki.

Politikarin má ganga á odda

Politikarin er noyddur at ganga fremst og gera upp við gamlar tankar um, at alt er líka umráðandi.

Alt er umráðandi, ja, men fyri at koma víðari eru teir noyddir at satsa uppá umráðir, sum skal tryggja framtíðina hjá okkum øllum.

Um politikararnir ikki tora at taka møguleikan nú, uttan at tað er neyð og vesaldóm, so fáa vit tá verður tað ein vanlukka fyri okkum øll.

Landið skal stuðla

Mær vitandi er tað ikki nógv landið stuðlar íverksetarum, hetta má broytast, so at landið stuðlar íverksetarum munandi og tað skal verða soleiðis, at sjálvt um ein fer á heysin, so skal tað verða lætt at byrja av nýggjum.

Við hesum hugburðinum fáa vit eina íverksetaramentan, sum stuðlar nýggjum og verandi íverksetarum, og harvið vøksturin í landinum við nýggjum og neyðugum vinnum.

Hesar reglur eru galdandi í nógvum londum rundan um okkum, frá Finnlandi til California, og hava haft nógv góð úrslit við sær t.d. Nokia í Finnlandi og kt- og biotek í California.

Tey goyma seg

Vit hava nógv gávað fólk í Føroyum, tað er eingin ivi um tað, men tey goyma seg, tá tey hoyra frá øðrum við einum góðum hugskotið, hvussu tey hava runni frá Heródus til Pilatus fyri at fáa figging.

Tí skal tað í byrjanini vera landið, sum letur munandi figging. Landið skal ikki figgja í ov langa tíð, áðrenn teir vanligu figgingarstovnar og feløg taka yvir, men landið skal tora at missa nakað, tí tað vil verða smápengar samanborið við hvat kann vinnast, tá í rættar ílegur eru gjørdar.

Latum onnur koma framat

Tað er eingin orsøk til, at land og fólk skulu pínast niður, sum ávísir politikarar, búskaparfrøðingar og onnur halda, fyri at nýggjar vinnur skulu síggja dagsins ljós í Føroyum.

Nei, broyt heldur tey smáu kongadømini í tí almenna og privata sektorinum, skift fólk út og flyt tey í annað starv, hesi, sum hava siti alt ov leingi í sama starvið og tí ikki hava nakað nýtt at bjóða í verandi starvið.

Latum onnur koma framat, sum hava hugsjónir um, at sjálvsagt kunnu vit fáa nýggjar vinnur her á landið, bæði tá tað gongur gott og tá ið tað gongur illa.

Mín lítla Bíbliu eskja

Heimamissiónsforlagið hevur givið út nýggja barnabók. Talan er um fýra smáar bøkur í eini eskju

BÓKAÚTGÁVA

Eskjan eitur »Mín lítla Bíbliueskja«, og bøkurnar eru:

Smáar bønir

Bønir, beinleiðis úr Bíbliuni, sum til dømis:

Tosa við meg, góði Gud.
Eg vil liva mítt lív fyri teg, og eg lurti eftir, hvat tú hevur at siga mær.
Bøn Sámuels

úr 1. Sám. 3,10

Smáir sálmar

Sálmar beinleiðis úr Bíbliuni, sum til dømis:

Góði Guð,
Lær meg hvat tú heldur vera rætt og rangt, og eg skal lýða.
At gera tað rætta fer at geva mær gleði.
Tað fer at geva mær størri gleði enn allir heimsins pengar

úr Sálma 119,33-36

Smáar signingar

Signingar beinleiðis úr Bíbliuni, sum til dømis:

Guð signi teg og taki sær av tær.
Guð veri góður ímóti tær, og hjálpsamur í tí góða.
Guð sær teg í kærleika og gevur tær sín frið.

úr 4. Mós. 6,24-26

Smá orðatøk

Orðatøk beinleiðis úr Bíbliuni, sum til dømis:

Vís virðing fyri teimum gomlu. Tey eru týdningarmikil, og tú mást vísa tað í tínum aburði mótvegis teimum.

úr 3. Mós. 19,32

Bæði bøkurnar og eskjan eru vakurt prýddar við myndum. Edward Poulsen hevur týtt innihaldið úr enskum.

– Bøkurnar kunnu verða ein góð hjálp hjá vaksnum, tá tey skulu læra børnini at skilja tað, sum stendur í Bibliuni, sigur Heimamissiónsforlagið.

Eskjan við teimum fýra bókunum kostar 89 krónur

Óli Olsen og Kári Sverrisson hava gjørt øll løgini uttan eitt, ið Kári Sverrisson og Magnus Johannessen hava gjørt

Enekk nærkast jørðini

Nýggj fløga við bólkinum Enekk

FLØGUÚTGÁVA

Fjórða fløgan hjá bólkinum Enekk er nú komin út. Hon ber heitið »Meðan vit nærkast jørðini«, og á fløguni eru níggju sangir og fýra instrumentalløg.

Óli Olsen og Kári Sverrisson hava gjørt øll løgini uttan eitt, ið Kári Sverrisson og Magnus Johannessen hava gjørt.

Flestu tekstirnir eru nýskrivaðir tekstir á føroyskum hjá Kára Sverrissyni, men týddir tekstir hjá trimum útlendskum yrkjarum verða eisini nýttir: yrkjararnir eru Federico García Lorca, Snorri Hjartarson og Arseniy Tarkovsky.

Tey, ið eru við á fløguni, eru: Óli Olsen, flygil og rhodes - Kári Sverrisson, sang og kassagittarar - Mikael Blak, kontrabass og akkustiskan bass - Heðin Z. Davidsen, ravmagnsgittar - Rógvi á Rógvu, trummur og ásláttur - Anelia Blagoeva Philbrow, upplestur - Pete Tilley, jarðarluður - Unn Paturson, sang - Valeri Dimchev, tambora og Desislava Dimcheva, sang.

Fløgan er upptikin í Útvarpshøllini, Norðurlandahúsinum og á Argjum og varð lutvíst ljóðblandað á Argjum og lutvíst í Air Play Studios í Århus. Upptøkufólk vóru Jan Zachariassen, Jónheðin Tróndheim og Jónas Bloch Danielsen. Ljóðblandarar vóru Árni Bergmann, Jonas Møller og Jónheðin Tróndheim.

Justin Philbrow og Kári Sverrisson gjørdu húsan, og fløgan er margfaldað í Týsklandi.

Mentanargrunnur Landsins, Fjølrit, FØT og Gramex stuðlaðu útgávuni.

Tað er Tutl, ið stendur fyri útbreiðsluni av fløguni.